## Mikudagur 24. juli

**SVF**

- 18.30 Lítla bjørn 10:26
- 19.00 Neri, havsins genta 13:26
- 19.25 Drotning og einlig mamma - norsk sending
- 20.00 Gesturin
- 20.25 Airport - úr Heathrow floghavn
- 20.50 Julia Roberts og mongolskir hestar
- 21.45 Gooniarnir - amerikanskur ævintýrfilmur - Óhóskandi fyri smábørn
- 23.35 Banjos likørstova
- 00.05 Liðugt

**Eurosport**

- 07:30 Cycling: Tour De France
- 09:30 Mountain Bike: World Cup Telluride United States
- 10:30 Cycling Live: Tour De France
- 16:45 News: Eurosportnews Flash
- 17:00 Football Live: European Under-19 Championship Norway
- 19:00 Football Live: Friendly Match
- 21:00 Cycling: Tour De France
- 23:00 News: Eurosportnews Report
- 23:15 Sailing: Sailing World
- 23:45 Superbike: Superbike Mag
- 00:15 News: Eurosportnews Report

**BBC Prime**

- 0.00 TLZ: »Reputations – Joe Louis The Boxer Who Beat Hitler
- 1.00 TLZ: »Earth Story – Ring of Fire
- 2.00 TLZ: »Putting Training to Work: Britain and Germany
- 2.25 TLZ: »Mind Bites«
- 2.30 TLZ: »Theory and Practice
- 2.55 TLZ: »Pause«
- 3.00 TLZ: »Public Murals in New York
- 3.25 TLZ: »Cyberart«
- 3.30 Ou Dd200 The Euro Beat
- 4.00 TLZ: »Branded – Levis: Blue Dreams
- 4.40 TLZ: »The Geography Programme – South Africa – People and Work
- 5.00 TLZ: »Spain Inside Out – Cities of the South
- 5.30 Look Ahead
- 6.00 Smarteenies
- 6.15 The Story Makers
- 6.30 Salut Serge
- 6.45 Bodger and Badger: »The Et Toothbrush
- 7.00 Playdays: »Dot Stop«
- 7.20 Blue Peter
- 7.45 Garden Invaders: »Whalley Range
- 8.15 Real Rooms: »Alderminster School House
- 8.45 The Antiques Inspectors Kent
- 9.15 Bargain Hunt: »Detling
- 9.45 Vets to the Rescue
- 10.15 The Weakest Link
- 11.00 Dr. Who: »Ghost Light«
- 11.30 Doctors
- 12.00 Eastenders
- 12.30 Hetty Wainthropp Investigates: »Woman of the YEAR
- 13.30 Garden Invaders: »Sale
- 14.00 Smarteenies
- 14.15 The Story Makers
- 14.30 Salut Serge
- 14.45 Bodger and Badger: »The Et Toothbrush
- 15.00 Playdays: »Dot Stop«
- 15.20 Blue Peter
- 15.45 Miss Marple: »Sleeping Murder« Part 2 >
- 16.45 Battersea Dogs Home
- 17.15 Gary Rhodes: »Soups
- 17.45 The Weakest Link
- 18.30 Doctors
- 19.00 Eastenders
- 19.30 Yes Minister: »The Right to Know
- 20.00 Casualty
- 21.00 Hippies Hairy Hippies
- 21.30 Dalziel and Pascoe: »An Autumn Shroud
- 23.00 Later with Jools Holland

**BBC World**

- 00:00 BBC News
- 00:30 HARDtalk (r)
- 01:00 BBC News
- 01:30 21st Century English (r)
- 02:00 BBC News
- 02:30 Reporters (r)
- 03:00 BBC News
- 03:30 Asia Today (r)
- 03:45 World Business Report (r)
- 04:00 BBC News
- 04:30 HARDtalk
- 05:00 BBC News
- 05:30 World Business Report
- 06:00 BBC News
- 06:30 World Business Report
- 07:00 BBC News
- 07:30 World Business Report
- 07:45 Sport Today
- 08:00 BBC News
- 08:30 21st Century English (r)
- 09:00 BBC News
- 09:30 HARDtalk (r)
- 10:00 BBC News
- 10:30 Reporters (r)
- 11:00 BBC News
- 11:30 Asia Today
- 11:45 World Business Report
- 12:00 BBC News
- 12:30 HARDtalk (r)
- 13:00 BBC News
- 13:30 World Business Report
- 13:45 Sport Today
- 14:00 BBC News
- 14:30 Click Online (r)
- 15:00 BBC News
- 15:30 Asia Today
- 16:00 BBC News
- 16:30 HARDtalk (r)
- 17:00 BBC News
- 17:15 World Business Report
- 17:30 Fast Track (r)
- 17:45 Holiday (r)
- 18:00 BBC News
- 18:30 World Business Report
- 18:45 Sport Today
- 19:00 BBC News
- 19:30 HARDtalk (r)
- 20:00 BBC News
- 20:30 The Bike's The Star
- 21:00 BBC News
- 21:30 World Business Report
- 22:00 BBC News
- 22:30 Simpson's World
- 23:00 BBC News
- 23:30 World Business Report (r)
- 23:45 Asia Today

**3**

- 05:00 Garfield Og Venner
- 05:25 Børnehjørnet
- 07:15 Tv-Shop
- 09:15 Ricki Lake
- 10:10 Horton-Sagaen
- 11:00 Horton-Sagaen
- 11:55 Once & Again
- 12:50 Family Law
- 13:45 Grace And Glorie
- 15:35 Blossom
- 16:05 Ricki Lake
- 17:00 Alle Elsker Raymond
- 17:30 Vild Med Dig
- 18:00 Med Pâ Moden
- 18:30 Alle Tiders Barnepige
- 19:00 Au Pair
- 20:50 De Hurtige Og De Døde
- 22:55 Seinfeld
- 23:25 Ti Tommelfingre
- 23:55 Walker Texas Ranger
- 00:55 Nash Bridges
- 01:55 Træneren
- 02:25 Træneren
- 02:55 Ti Tommelfingre
- 03:25 Sunset Beach
- 04:15 Godnat

**ÚF**

- 07.00 Tíðindi
- 07.05 Morgunlestur - Petur Jacob Sigvardsen í Havn lesur
- 07.15 Morguntónleikur
- 07.30 Tíðindi
- 07.35 Góðan morgun Føroyar - Øssur Egholm er vertur
- 08.00 Tíðindi
- 08.03 Góðan morgun Føroyar
- 09.00 Tíðindi
- 09.03 Teir gloymdu, sum vaktu heimin (e) - Fyrri partur av frásøgumynd, sum Árni Joensen skrivar.
- 09.35 Dagsins tónar
- 09.50 Morgunlestur (e) - Petur Jacob Sigvardsen í Havn lesur
- 10.00 Tíðindi
- 10.03 Fimleikaløtan 2
- 10.10 Kvøðuljómar til sjófólkið
- 11.00 Tíðindi
- 11.03 Tónatutl (e) - Bitar úr søguni hjá felagnum Tutl. Hans Egholm stílar fyri
- 11.35 Undir døgurða
- 12.00 Veðurtíðindi
- 12.02 Middagstónleikur
- 12.15 Skráin og lýsingar
- 12.20 Tíðindini
- 12.40 Døgurðatónar
- 13.00 Tónatímin
- 14.00 Rót og rútma (e) - Petur Rouch velur country tónleik
- 15.00 Tíðindi
- 15.03 Barometrið - Bjarni Mohr, Rúni Jákupsson og Heri Jacobsen skipa fyri.
- 16.00 Tíðindi
- 16.03 Barometrið
- 17.00 Tíðindi
- 17.05 Kyrrindi - Tónleikasending hjá Fimmboða Lisberg
- 18.00 Norðstjørnan - Kim Hansen stílar fyri
- 18.25 Skráin og lýsingar
- 18.30 Tíðindini
- 19.00 Sjónarringurin - Árni Joensen leggur til rættis
- 19.30 Á sanganna veingjum - Gunnvør Poulsen leggur til rættis
- 20.00 Jarnbrot - Harður rokkur í 30 ár. Fróði Løkságarð leggur til rættis
- 21.00 Tíðindi
- 21.05 Dagsetur - Ginna Midjord leggur til rættis
- 22.00 Tíðindi

**Rás**

- 09:45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen.
- 10:00 Tónleikur
- 12:00 Tíðindi og kunngerðir
- 12:15 Tónleikur
- 13:30 Summar á Rás 2 - Hetta er seinnapartstilfar við øllum møguligum tónleiki, tíðindum og samrøðum. Tað verður eingin føst skrá, ið Rásin skal halda, men heldur ein møguleiki hjá øllum møguligum fólkum at koma inn á gólvið at tosa um alt møguligt millum himmal og jørð.
- 17:00 Halleluja (e) - Endursending frá mánakvøldinum. Andalig tónleikasending v/ Heina Lutzen og Jógvan Poulsen.
- 18:00 Tíðindi og kunngerðir
- 18:15 Tónleikur
- 21:15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun. Bíbliulestur v/ Anju Hansen.
- 21:25 Tónleikur
- 23:00 Liðugt

**Lindin**

- 13.00 Byrjan - Dagsskráin verður lisin
- 13.05 Bankabók Trúarinnar - eftir C.H.Spurgeon
- 13.30 "Mangt og Hvat" frá Leygardegnum (e)
- 16.00 Vit spæla tónleik fyri ung
- 17.00 Bønartænastan byrjar. Tlf. 321377, tilber at senda fax nr. 321379.
- 17.55 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
- 18.00 Bønartænastan - Biðji verður fyri bønarevnunum
- 19.00 Ein forvitnislig ferð gjøgnum Bíbliuna v/Símun Absalonsen og Jógvan Zachariassen.
- 20.55 Bankabók Trúarinnar - eftir C.H.Spurgeon
- 21.00 Tónar og innihald v/Høgni Háberg Hansen og Jan Zachariassen
- 22.00 Tónleikur
- 22.55 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
- 23.00 Dagsskráin fyri hósdag verður lisin
- 23.10 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a..
- 02:00 Leygarkvøld í Lindini (e)
- 03.00 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a..
- 06.00 Vit gevast

## Hósdagur 25. juli

**SVF**

- 18.30 Heidi og fjallaabbin 11:26
- 18.55 Oggy og kakkulakkarnir
- 19.05 Antennufelagið - da. skemtifilmur
- 20.00 Dagur og Vika
- 20.20 Vagn í Japan
- 20.50 Ally McBeal
- 21.15 Maðurin úr Mallorka - svenskur krimi - Óhóskandi fyri smábørn
- 22.55 Napoleon 4:4
- 23.50 Liðugt

**Eurosport**

- 07:30 Sailing: Sailing World
- 08:00 Mountain Bike: World Cup Telluride United States
- 08:30 Football: Friendly Match
- 10:30 Football: European Under-19 Championship Norway
- 12:00 Cycling Live: Tour De France
- 16:45 News: Eurosportnews Flash
- 17:00 Football Live: European Under-19 Championship Norway
- 19:00 Cycling: Tour De France +
- 19:30 Boxing: International Contest
- 21:00 Cycling: Tour De France
- 22:00 News: Eurosportnews Report
- 22:15 Olympic Games: Olympic Games
- 22:45 Olympic Games: Olympic Magazine
- 23:15 Formula 1: Inside Formula
- 23:45 Cycling: Tour De France +
- 00:15 News: Eurosportnews Report

**BBC Prime**

- 0.00 TLZ: »The River – Delivering the Kingdom
- 1.00 Moon Children - Horizon
- 2.00 TLZ: »Your Place Or Mine
- 2.30 TLZ: »The British Family: Sources and Myths
- 2.55 TLZ: »Computing and History
- 3.00 TLZ: »Cities in a Hurry
- 3.30 TLZ: »No Place to hide«
- 3.55 TLZ: »Maps – Under the Lens - River
- 4.00 Trouble At the Top Chinese Takeaway
- 4.40 Shakespeare Shorts Julius Caesar
- 5.00 TLZ: »Jeunes Francophones – Le Sport
- 5.30 English Zone
- 6.00 Smarteenies
- 6.15 The Story Makers: »Carnival
- 6.30 Salut Serge
- 6.45 Yoho Ahoy: »Pop
- 6.50 Toucan Tecs: »Potty Pirates
- 7.00 Playdays: »Patch Stop«
- 7.20 Blue Peter Flies the World: »Canada
- 7.45 Garden Invaders: »Sale
- 8.15 Real Rooms: »Sea Scout Hut
- 8.45 The Antiques Inspectors Portmeirion
- 9.15 Battersea Dogs Home
- 9.45 Vets to the Rescue
- 10.15 The Weakest Link
- 11.00 Dr. Who: »The Curse of Fenric«
- 11.30 Doctors
- 12.00 Eastenders
- 12.30 Miss Marple: »Sleeping Murder« Part 2 >
- 13.30 Garden Invaders: »West Derby
- 14.00 Smarteenies
- 14.15 The Story Makers: »Carnival
- 14.30 Salut Serge
- 14.45 Toucan Tecs: »Potty Pirates
- 14.55 Playdays: »Patch Stop«
- 15.15 Totp Eurochart
- 15.45 All Creatures Great & Small: »Promises to Keep
- 16.45 Ground Force: »Northampton
- 17.15 Gardeners' World
- 17.45 The Weakest Link
- 18.30 Doctors
- 19.00 Eastenders
- 19.30 2 Point 4 Children: »Mayday
- 20.00 The Lakes
- 21.00 Bottom: »S Out
- 21.30 State of the Planet: »The Future of Life
- 22.30 Ray Mears' Extreme Survival: »Desert Island
- 23.00 Casualty

**BBC World**

- 00:00 BBC News
- 00:30 HARDtalk (r)
- 01:00 BBC News
- 01:30 Fast Track (r)
- 01:45 Holiday (r)
- 02:00 BBC News
- 02:30 Simpson's World (r)
- 03:00 BBC News
- 03:30 Asia Today (r)
- 03:45 World Business Report (r)
- 04:00 BBC News
- 04:30 HARDtalk
- 05:00 BBC News
- 05:30 World Business Report
- 06:00 BBC News
- 06:30 World Business Report
- 07:00 BBC News
- 07:30 World Business Report
- 07:45 Sport Today
- 08:00 BBC News
- 08:30 Fast Track (r)
- 08:45 Holiday (r)
- 09:00 BBC News
- 09:30 HARDtalk (r)
- 10:00 BBC News
- 10:30 Simpson's World (r)
- 11:00 BBC News
- 11:30 Asia Today
- 11:45 World Business Report
- 12:00 BBC News
- 12:30 HARDtalk (r)
- 13:00 BBC News
- 13:30 World Business Report
- 13:45 Sport Today
- 14:00 BBC News
- 14:30 The Bike's The Star (r)
- 15:00 BBC News
- 15:30 Asia Today
- 16:00 BBC News
- 16:30 HARDtalk (r)
- 17:00 BBC News
- 17:15 World Business Report
- 17:30 Talking Movies (r)
- 18:00 BBC News
- 18:30 World Business Report
- 18:45 Sport Today
- 19:00 BBC News
- 19:30 HARDtalk (r)
- 20:00 BBC News
- 20:30 Click Online
- 21:00 BBC News
- 21:30 World Business Report
- 22:00 BBC News
- 22:30 Developing World
- 23:00 BBC News
- 23:30 World Business Report (r)
- 23:45 Asia Today

**3**

- 05:00 Garfield Og Venner
- 05:25 Børnehjørnet
- 07:15 Tv-Shop
- 09:15 Ricki Lake
- 10:10 Horton-Sagaen
- 11:00 Horton-Sagaen
- 11:55 Once & Again
- 12:50 Family Law
- 13:50 Ratz
- 15:35 Blossom
- 16:05 Ricki Lake
- 17:00 Alle Elsker Raymond
- 17:30 Vild Med Dig
- 18:00 Med Pâ Moden
- 18:30 Alle Tiders Barnepige
- 19:00 Zorro - Den Maskerede Hævner
- 21:35 White Palace
- 23:30 Seinfeld
- 00:00 Ti Tommelfingre
- 00:30 Walker Texas Ranger
- 01:30 Nash Bridges
- 02:30 Træneren
- 03:00 Træneren
- 04:00 Sunset Beach
- 04:50 Godnat

**ÚF**

- 07.00 Tíðindi
- 07.05 Morgunlestur - Petur Jacob Sigvardsen í Havn lesur
- 07.15 Morguntónleikur
- 07.30 Tíðindi
- 07.35 Góðan morgun Føroyar - Øssur Egholm er vertur
- 08.00 Tíðindi
- 08.03 Góðan morgun Føroyar
- 09.00 Tíðindi
- 09.03 Sjónarringurin (e) - Árni Joensen leggur til rættis
- 09.35 Dagsins tónar
- 09.50 Morgunlestur (e) - Petur Jacob Sigvardsen í Havn lesur
- 10.00 Tíðindi
- 10.03 Fimleikaløtan 2
- 10.10 Tit skriva, vit spæla - Elis Poulsen stílar fyri
- 11.00 Tíðindi
- 11.03 Faktor fimm (e) - Lættur summartónleikur hjá Gunnari Nolsøe
- 12.00 Veðurtíðindi
- 12.02 Middagstónleikur
- 12.15 Skráin og lýsingar
- 12.20 Tíðindini
- 12.40 Døgurðatónar
- 13.00 Tónatímin
- 14.00 15 tær bestu (e) - Niels Uni Dam stílar fyri
- 15.00 Tíðindi
- 15.03 Barometrið - Bjarni Mohr, Rúni Jákupsson og Heri Jacobsen skipa fyri.
- 16.00 Tíðindi
- 16.03 Barometrið
- 17.00 Tíðindi
- 17.05 Í víngarðinum - Símun Jóannesarson Hansen stílar fyri
- 18.00 Barnaútvarpið - Jonna og Katrin stíla fyri
- 18.25 Skráin og lýsingar
- 18.30 Tíðindini
- 19.00 Garpatáttur - Hans Tórgarð lesur 11. part av skaldsøgu eftir Halldór Laxness, sum Tóra Tóroddsdóttir og Martin Næs hava týtt.
- 19.30 Krás - Tónleikasending hjá James Olsen
- 20.00 Ljóðmúrurin - Regin Egholm skipar fyri
- 21.00 Tíðindi
- 21.05 Dagsetur - Ginna Midjord leggur til rættis
- 22.00 Tíðindi

**Rás**

- 09:45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen.
- 10:00 Tónleikur
- 12:00 Tíðindi og kunngerðir
- 12:15 Tónleikur
- 13:30 Summar á Rás 2 - Hetta er seinnapartstilfar við øllum møguligum tónleiki, tíðindum og samrøðum. Tað verður eingin føst skrá, ið Rásin skal halda, men heldur ein møguleiki hjá øllum møguligum fólkum at koma inn á gólvið at tosa um alt møguligt millum himmal og jørð.
- 18:00 Tíðindi og kunngerðir
- 18:15 Tónleikur
- 19:00 Orð á leiðini (EvR) - Jógvan Zachariassen leggur til rættis.
- 19:40 Tónleikur
- 21:15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun. Bíbliulestur v/ Anju Hansen.
- 21:25 Tónleikur
- 22:00 Girlzone - Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri. Telefon: 35 99 93 Fax: 35 99 90 E-mail: girlzone@ras2.fo
- 00:00 Liðugt

**Lindin**

- 13.00 Byrjan - Dagsskráin verður lisin
- 13.05 Bankabók Trúarinnar - eftir C.H.Spurgeon
- 13.30 Sjómansendingin Vitin v/M.C.Resteroff (e)
- 14.30 Barnalindin endursending frá Sunnudegnum
- 15.00 Horizon Star v/Stellu Zachariassen
- 18.00 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti
- 19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending.
- 20.00 Barnalindin endursending frá Sunnudegnum
- 20.55 Bankabók Trúarinnar - eftir C.H.Spurgeon
- 21.00 Bønarlinjan beinleiðis sending við gesti vertur er Jenis av Rana. Bønarevnir kunnu ringjast inn frá kl. 20.00 Tlf. 321377 og fax á nr. 321379.
- 00.00 uml. Dagsins Orð eftir Svenning av Lofti.
- 02:00 Ein forvitnislig ferð gjøgnum Bíbliuna (e)
- 03.00 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a..
- 06.00 Vit gevast



Anton frá Robinson Ekspeditionen 2000:

# Danir kunnu læra av føroyingum

**– At fara svangur í song í 40 dagar út í eitt kann ikki samanberast við nakað. Hetta, saman við hinum royndunum á oynni, gevur eitt heilt serligt samanhald millum allar luttakarnar. Eingin annar skilur hetta, tí eingin kann seta seg inn í okkara støðu. Hetta sigur Anton, sum var við í Robinson Ekspeditiónini í ár 2000. Hann er í hesum døgum í Føroyum og vitjar familju hjá unnustu síni**



*Anton frá Robinson Ekspeditionen 2000 heldur, at danir kunnu læra nógv av føroyingum*

*Mynd: Finnur Justinussen*

FØROYAVITJAN
*Ragnhild Ellingsgaard*

Hann hevur júst keypt ein bóndagarð saman við foreldrunum og systur síni. Hann kallar seg "en rigtig bonderøv", og kann ikki liva uttan náttúruna. Hann hevur ongantíð búð longur enn 50 m burtur frá eini skóg, og hann er veiðumaður um ein háls.

Í løtuni eru skógirnar tó býttar um við føroysku fjøllini. Skjótt 40 ára gamli Anton frá Robinson Ekspeditiónini 2000 er í hesum døgum staddur í Føroyum, har hann vitjar familju hjá unnustu síni, sum hevur føroyskan pápa.

### "Øll kenna meg"

Hóast tvey ár eru liðin, síðani Anton luttók í Robinson-dystinum, sum TV3 stílar fyri, so hava fólk ikki gloymt hann.

Í Danmark verður hann í heilum boðin við til móttøkur av ymsum slag, saman við "de kendte", sum hann sjálvur málber seg.

Men eisini í Føroyum verður hann steðgaður av fólki, sum hava fylgt honum í sendingunum.

- Longu umborð á Norrønu á veg til Føroyar varð eg steðgaður av fólki, sum kendu meg aftur, greiðir Anton frá.

Eisini tollarin helt seg kenna danan, tá hann kom á land í Føroyum.

- Hann bleiv við at spyrja, um vit ikki kendust frá fyrr av. Eg segði so, at hetta var fyrstu ferð, at eg vitjaði í Føroyum, so vit høvdu neyvan sæð hvønn annan fyrr. Hesum vildi hann tó ikki trúgva, og eg mátti fortelja honum, at eg hevði verið við í Robinson í 2000. Tástani fall fimmoyrað hjá manninum, sigur Anton.

Anton hevur, saman við verfamiljuni, verið á eini rundferð í Føroyum, har tey hava vitjað fleiri støð. Anton hevur sjálvur bil við á ferðini, og hetta ger alt munandi léttari, heldur hann.

- Vit hava koyrt eini 1000 km., so vit hava sæð eitt sindur av hvørjum, greiðir hann frá.

Á hvørjum staði hava fólk steðgað Antoni, tí tey kenna hann aftur. Onkur veittrar til hansara, meðan bilar í hópatali floyta eftir honum, tá hann er til gongu.

Serliga ein hending hevur bitið seg fasta í minnið hjá Anton. Umborð á Dúgvuni á veg til Leirvíkar hitti hann ein tánnaring. Hetta var ein ungur drongur, sum var føddur í Klaksvík, men búði í Havn.

- Hann kom til mín og spurdi, um eg ikki var Anton frá Robinson. Eg játtaði og spurdi, hvør hann var og hvat hann gjørdi. Hann greiddi mær frá, at hann gekk í skúla, men hevði ein dreym um at læra til kokk. Hóast hann var so ungur, so hevði hann heilt klárar ætlanir við framtíðini, og tað yvirraskaði meg. Vit tosaðu saman allan túrin, og áðrenn eg visti av, vóru vit á Leirvíkskei, og eg mátti siga farvæl við dreingin. Eg bað hann fylgja sínum dreymum, tí so kann einki ganga galið, greiðir Anton frá og leggur afturat, at hann nokk altíð fer at minnast hendan unglinga.

Hóast vit føroyingar halda, at vit fylgja væl við í tí, sum fer fram uttanlanda, so er Anton bilsin yvir, at føroyingar eisini kenna til Robinson.

- At koma til Føroyar er júst, sum tað var í Danmark, tá eg kom aftur av Robinson. Øll kenna meg, og eg komi í kontakt við nógv ymisk fólk, sum hava fylgt sendingunum. Hetta hevði eg als ikki væntað, sigur hann.

### Læra av føroyingum

Anton er ein fryntiligur maður og tosar nógv. Mest tosar hann um, hvussu vakrar Føroyar eru, og hvussu væl honum dámar føroyingar.

- Vanligt er, at danir royna at hyggja suðureftir fyri at læra av familjusamanhaldinum hjá suðurlendingum. Men í Føroyum er samanhaldið fimm ferðir betri enn í suðurlondinum, so vit skuldu nógv heldur hugt hendanvegin, heldur hann.

Anton skal sjálvur flyta á ein bóndagarð saman við foreldrunum, systrini og unnustu síni. Orsøkina til hetta sigur hann vera, at foreldrini eru gomul, og hann ynskir at taka sær av teimum og vera um tey.

Sjálvur eigur Anton ein tvey ára gamlan son við fyrrverandi konuni, og í septembur mánaða verður hann væntandi pápi at eini gentu, sum núverandi unnustan ber undir belti.

- At verða pápi er uttan iva tað størsta, eg nakrantíð havi roynt. Og eg gleði meg vilt, til gentan hjá okkum kemur í heimin, sigur hann.

Hann heldur eisini, at ferðin í Føroyum hevur víst honum, hvussu ein røtt familja eigur at vera.

- Øll í Føroyum standa hvør øðrum so nær, og familjurnar hava eitt veruligt samanhald. Soleiðis skuldi tað eisini verið í Danmark, sigur hann hugsunarsamur.

### Ein annar heimur

Vit sleppa ikki uttan um Robinson Ekspeditiónunum, tá vit tosa við Anton. Í løtuni er ein røð av nýggjum sendingum farin í gongd, har nøkur útvald frá teim fyrru ekspeditiónunum eru við í kappingini.

Sjálvur er Anton keddur av, at hann ikki var við í teim útvaldu, sum sluppu at royna seg enn einaferð.

- Men eg var opninbart ikki góður nokk, so tað gerst ikki við, sigur hann skemtandi.

Hann greiðir eisini frá, at Robinson Ekspeditiónin er ein heilt annar heimur at trína inn í.

- Vit fóru svong í song hvørt einasta kvøld, og saman við hinum royndunum gjørdi hetta uppihaldið til nakað heilt serligt. Tað ber als ikki til at forklára, hvussu tað var á oynni. Eingin, sum ikki hevur roynt tað, kann skilja hetta, sigur hann.

Tilsamans 64 danir og ein føroyingur hava staðið sína roynd í Robinson-sendingunum. Hjá onkrum hevur eydnast betur enn hja øðrum, men Anton dylur ikki fyri, at hann hevði farið avstað aftur, um hann fekk tilboðið.

Anton greiðir frá, at hann hevur fingið nøkur heilt góð vinfólk millum luttakararnar, og tey plaga við jøvnum millumbili at hittast.

- Samanhaldið úti á oynni heldur enn í dag, og vit eru líkasum ein serlig klika, sigur hann.

Sjálvur kennur Anton ikki úrslitið av teim sendingunum, sum verða framleiddar í løtuni. Men hann heldur seg tó hava eina hóming av, hvør møguliga fer avstað við sigrinum hesuferð.

- Eg kann tó ikki siga nakað meir, enn at Hassan er ótrúliga sterkur og fer hann óivað at standa seg væl í kappingunum, sigur hann við einum smíli.

Hóast Føroyar ikki minna nakað um Robinson-oynna, so er eingin ivi í huganum hjá Antoni: Hetta er ikki seinastu ferð, at hann vitjar her á klettunum.

- Eg eri bara keddur av, at eg nústani havi tikið meg saman við at vitja Føroyar. Men tað má eg so bara gera gott aftur, við at koma aftur á vitjan skjótast gjørligt, sigur Anton frá Robinson Ekspeditiónini ár 2000 á veg út um hurðina.